# Pedagogar fingið prógv

**Ein flokkur av pedagognæmingum fekk fríggjadagin prógv á Føroya Læraraskúla**

UNDIRVÍSING

Fríggjadagin fingu 25 nýggir pedagogar prógv á Føroya Læraraskúla.

Í samband við dagin høvdu teir sjálvir doypt skúlan um til Føroya Læraraskúla & Pedagogskúla.

Í røðu síni, tá prógvini vórðu handað í Læraraskúlahøllini, segði rektarin, Pauli Nielsen, at honum dámdi hetta als ikki so illa.

Í grundini tók hann so væl undir við hesum hugskotinum, segði hann, at hann hevði boðað avvarðandi myndugleikum frá, at hann sjálvur helt, at skúlin í framtíðini eigur at eita »Námssetur Føroya« og so nýta navnið á teimum ymsu útbúvingunum sum undirheiti.

**ej**



*Bogi Andreasen, Ingerð Andreasen, Fríðgerð Baldvinsson, Beinta Dalbø, Christel Danielsen, Laila Friis, Rúni Gaardlykke, Jóna Guttesen, Ann Hansen, Siri Hjørleifsdóttir, Katrin Hofgaard, Cathrina Jacobsen, Anja Johannesen, Jóhanna Kristiansen, Jógvan Mortensen, Eydna Olsen, Helen Olsen, Pauli Olsen, Angela Petersen, Johan á Plógv, Hildur Debes Samuelsen, Bárður Sigurðsson, Eyð Skúvadal, Guðrun Vang, Sigrun Vágstún*


# Nýtekning av partapeningi í P/F Smyril Line

**Í sambandi við hækkan av partapeningi í P/F Smyril Line upp til 300 milliónir kr., hava núverandi partaeigarar framíhjárætt at tekna upp til allan partapeningin.**

**Núverandi partaeigarar kunnu gera rætt sín galdandi til í seinasta lagi 23. februar 2001.**

**Partapeningurin verður hækkaður við tí fyrivarni, at nýteknaði partapeningurin verður 125 milliónir kr. innan 10. mars 2001.**




**Nýtekning av partapeningi í P/F Smyril Line**

**Undirritaði partaeigari sum í dag eigur partabræv/ -brøv no. ______________**

**fyri tilsamans kr. ___________________**

**vil hervið nýtekna kr. _______________(min. 1.000,- kr. ella multipla av hesum)**

**Navn: ____________________________________________**

**Bústaður: ________________________________________**

**Bygd/ Býur: ______________________________________**

*The North Atlantic Link*

**SMYRIL LINE**

Postsmoga 370 · 110 Tórshavn

tel 34 59 00 · fax 31 64 93 · E-mail: finance@smyril-line.fo


# Vardi doktararitgerð

DOKTARARITGERÐ

*Stefan í Skorini*

41 ára gamli Andras Mortensen vardi fríggjadagin doktararitgerð sína um tann føroyska róðrarbátin. Andras hevur sostatt fingið doktaraheiti og kann tí kalla seg doktara í søgu.

Andras vardi ritgerðina "Hin føroyski róðrarbáturin" við undirheitinum "Sjómentir føroyinga í eldri tíð". Ritgerðin varð givin út í bók tann 30. november í fjør.

Tað var Fróðskaparsetur Føroya, sum skipaði fyri verjuni av ritgerðini, og hon fór fram í nýggju hølunum á Sjómansskúlanum.

Opponentar vóru Bjarne Stocklund professari á Københavns Universitet, Arne Emil Christensen professari úr Noregi og okkara Jóan Hendrik Winther Poulsen.

Andras Mortensen hevur arbeitt við hesi ritgerð síðan summarið 1997, tá hann var á námsferð í Noregi. Nú er arbeiðið at enda komið, og hann hevur eisini eitt frálíkt úrslit at vísa á.



*Andras Mortensen vardi fríggjadagin doktararitgerð sína á Fróðskaparsetrinum. Opponentarnir mæltu til at geva Andrasi doktaraheiti fyri ritgerðina "Hon føroyski róðrarbáturin"*

*Mynd: Jonhard Hammer*